Fra det færøske Plantningsudvalg har nærværende Udvalg modtaget en Skrivelse med Anmodning om at foranledige, at Lagtinget forinden at yde et Tilskud af 1000 Kr. aarlig til Fremme af den færøske Plantningssag tillige indstiller til Landbrugsministeriet, at der af Statskassen ydes et tilsvarende Tilskud foreløbig for Finansaarene 1937/38 til 39/40 incl.

Som bekendt har Staten i en Aarrække ydet 5000 Kr. aarlig til Plantningsforsøg paa Færøerne, men i Finansaarene 1934/35 og 1935/36 blev der kun ydet 3000 Kr. aarlig, og Bevillingen blev givet til Afvikling af Plantningsvirksomheden paa Færøerne. For Finansaaret 1936/37 opnaaedes der dog en Bevilling paa 1500 Kr. Hertil kommer Tilskud fra Lagtinget 1000 Kr. aarlig og fra Tórshavn Kommune 600 Kr. aarlig.

I sin Skrivelse fremhæver Plantningsudvalget Vigtigheden af, at Plantningsforsøgene fortsættes og har paa et Møde 26. November d. A. vedtaget følgende Plan for sin fortsatte Virksomhed:

1) Den gamle Plantage i Tórshavn vedligeholdes i den Stand, hvori den nu befinder sig, medens Nyplantninger ophører.

2) Den nye Plantage i Tórshavn (Varðin) færdigbeplantes i Løbet af 3 Aar.

3) Den thorshavnske Planteskoles Areal overlades Plantøren til privat Udnyttelse, dog at det sikres, at en Fjerdedel af Arealet anvendes til Opelskning af Træ- og Buskplanter, der sælges til Befolkningen til Priser, godkendte af Udvalget.

4) Driften af Plantagerne i Tvøroyri, Kunoy og Selatrað fortsættes som hidtil med begrænsede Tilskud fra Plantningsudvalget, idet Plantagerne iøvrigt overlades til Kommunernes Omsorg.

---

[1]) Sbr. løgtingst. 1935, bls. 327.

Til Gennemførelse af denne Plan kræves der et aarligt Budget paa ca. 2.600 Kr., nemlig:

Lønning til Plantøren	1.500 Kr.
Beplantning af Varðin	300 —
Udgifter ved Plantagen i Tvøroyri	300 —
— — — - Kunoy	100 —
— — — - Selatrað	100 —
Plantørens Tilsynsrejser	150 —
Forskellige Udgifter	150 —
Ialt	2.600 Kr.

Plantningsudvalget forudsætter, at der vil kunne opnaas følgende Tilskud: fra Løgtinget 1000 Kr. aarlig, fra Tórshavn Kommune 600 Kr. aarlig og fra Staten 1000 Kr. aarlig foreløbig kun for et Tidsrum af 3 Aar fra 1. April 1937 at regne, idet Beplantningen af Varðin til denne Tid vil være afsluttet, ligesom Plantagen i Tvøroyri vil være længere fremme, saaledes at der da vil kunne lægges et nyt Budget.

Idet man maa beklage, at der fra Statens Side ikke kan ydes Tilskud af samme Størrelse som tidligere, skal nærværende Udvalg udtale, at man er enig med Plantningsudvalget og mener, at det er af stor Betydning, at Plantningsvirksomheden paa Færøerne fortsættes, selv om dette ikke kan lade sig gøre i samme Omfang som før.

Udvalget tilraader derfor Tinget til at indgaa til Regeringen med Andragende om en Bevilling paa 1000 Kr. aarlig foreløbig i 3 Aar.

Forslag.

Lagtinget indgaar til Regeringen med Andragende om, at der for 3 Aar af Statskassen ydes en Bevilling paa 1000 Kr. aarlig til Træplantning paa Færøerne, imod at Færøernes Lagting og Tórshavns Kommune aarlig yder det sædvanlige Tilskud, henholdsvis 1000 og 600 Kr.

Tann 14. desember framlegði Trond Hansen o. fl. soljóðandi **Ændringsforslag:**

I Udvalgets Forslag forandres i 2den Linie »1000 Kr. aarlig« til »3000 Kr. aarlig«.

Samu dag varð broytingaruppskotið samtykt við 16 atkv. — 0. Uppskot nevndarinnar soleiðis broytt varð samtykt við 17 atkv. — 0.

---

188. Studningur til „Føroya Búnaðarfelag". (19|XIII).[1]

Fíggjarnevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning**:

Føroya Búnaðarfelag har ved Skrivelse af 29. September 1936 ansøgt Tinget om Tilskud paa 300 Kr. til Støtte for de Formaal, som Foreningen arbejder for.

Det fremgaar af Ansøgningen, at Foreningen har Penge behov bl. a. til sit Arbejde for Salg af færøske Kartofler, Undersøgelse af Kalkmangel i den færøske Jord samt Arbejdet for at finde Midler til Omlægning og Modernisering af Faarebruget.

Udvalget er klar over, at det er af stor Betydning at der arbejdes for at finde Midler til Modernisering af det færøske Jordbrug samt for at Salget af Landbrugsprodukter, særlig Kartofler, søges bragt ind i saadanne Former, at det kan virke betryggende for alle Parter. Saadanne Opgaver kan formentlig bedst løses ved Initiativ fra Landbrugernes egen Sammenslutning, Føroya Búnaðarfelag, og vil man derfor finde det rimeligt, at der ydes Foreningen Tilskud fra Tinget i Lighed med, hvad der er ydet de foregaaende Aar. Dog skal man be-

---

[1]) Sbr. løgtingstíðindi 1935, bls. 170.

mærke, at det synes noget mærkeligt, at Foreningen i 1935 kun har haft en Indtægt i Medlemsbidrag af 403 Kr. Ifald dette Forhold skyldes den Omstændighed, at Foreningen tæller saa faa Medlemmer, bør Bestyrelsen gøre noget særligt for at vække Interessen for Foreningens Arbejde blandt den landbrugende Del af Befolkningen og derved forøge Foreningens Medlemstal, hvorved denne bedre bliver i Stand til at røgte sine Opgaver.

Forslag.

1) Af Amtsfonden ydes Føroya Búnaðarfelag et Tilskud af 300 Kr.

2) Føroya Búnaðarfelag faar en Afskrift af denne Betænkning.

Tann 27. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 20 atkvøðum — 0.

189. Studningur til snøris- og togverksvirki. (21 & 56|XIII).

Figgjarnevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning:**

1) Fiskari Jógvan á Ryggi í Miðvági biður tingið um at veita sær studning uppá 2000 kr. til útreiðslur til at byrja eitt fiskasnøris- og togverksvirki her heima í Føroyum.

Hann sigur frá, at hann hevur vent sær til leiðarin av »Veiðafæragerð Reykjavíkar«, Hans Wick, sum hevur lovað at koma til Føroyar og læra hann snørisspuna og veita leiðbeining á einhvørn hátt hesum viðvíkjandi. Ferðin við upphaldi og kosti verður o. u. 2000 kr. — Honum tørvar eina spinnu- og tvinnumaskinu, men hús og drívkraft hevur hann gjørt útvegir fyri.

2) Brynjálfur á Heygum, Vestmanna, biður á sama hátt sum hin fyrrnevndi umsøkjari um studning til stovnan av einum snøris- og togverksvirki her í Føroyum.

Til tess tørvar honum 2000 kr. til keyp av maskinum. Ætlanin er at byrja við tveimum maskinum, sum kosta o. u. 2500 kr. hvor. Hús og drívkraft er hann førur fyri sjálvur at útvega.

Við hesum fyri eyga hevur hann í fjør verið í Reykjavík og vitjað snørisspinnarfíð har; leiðarin, áðurnevndi harra Wick, hevur lovað honum tu hjálp, hann var førur fyri til fremjan av hesum virki.

Figgjarnevndin má halda fyri, at tað hevur stóran týðning, um tað kann fáast í lag at stovnað verður snøris- og togverksvirki í Føroyum. Nevndin meinar, at tingið eigur at geva studning til eina slíka fyritøku og vil sefa fram uppskot herum.

Sum statt er meinar nevndin, at tað ikki er beint, at tað verða tvey konkurrerandi virkir. — Tað beinasta má vera, at umsøkjararnir slóu seg saman um at stovna eitt virki, navnliga táið alt prógvar, at tilboð er frá sama manni — harra Wick — at hjálpa báðum umsøkjarnum at fáa virkið í lag.

Uppskot.

Til stovnan av einum snøris- og logverksvirki í Føroyum veitir tingið úr økonomisk Fond 1000 kr. í studningi til Jógvan á Ryggi og Brynjálfur á Heygum. Studningur verður latin við teimum treytum, at umsøkjarnir sláa seg saman um at stovna eitt snøris- og logverksvirki.

Studningurin verður givin vinnunevndini upp í hendi við teimum áðurnevndu treytum.

Tann 3. desember framlegði Ellefsen o. fl. soljóðandi **broytingaruppskot:**

Til stovnan av snøris- og logverksvirkjum veitur tingið úr økonomisk fond 2000 kr. í studningi til Jógvan á Ryggi og Brynjálfur á Heygum (1000 kr. til hvønn).

Sama dag varð broytingaruppskotið sett undir atkvøðisgreiðslu og fall, bert 4 atkvøður — 0. Uppskot nevndarinnar varð samtykt við 15 atkvøðum — 0.

190. Studningur til rennistroug í Hesti. (22|XIII).

Figgjarnevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning:**

Jens Chr. Danielsen af Hestø ansøger om Tilskud til en Tovbane (rennistrong), som han agter at anlægge fra »Neytakonustíggj« i Hestø ned til Kørevejen.

Andrageren anfører, at en saadan Tovbane vil have stor Betydning for Beboere i Hestø, som har Tørveskær i den nordre Helft af Hestø (og det har næsten alle Hestøboerne) samt for de Personer, der udøver Fuglefangst.

Det er Meningen, at der skal være Adgang for alle Hestøens Beboere at benytte Tovbanen mod et mindre Vederlag til Vedligeholdelsesudgifter.

Landbrugskonsulenten anslaar i en Skrivelse af 2. f. M. Udgifterne til Anlægget at udgøre 500 Kr.

Forstanderskabet for Hestø anbefaler Andragendet.

Et Flertal (Dam, Davidsen, Jacobsen og Winther) stiller nedenfor Forslag om, at der ydes Andragerne et Tilskud paa 200 Kr. i ovenfor anførte Øjemed paa Betingelse af, at Hestø Sogns Kommune paatager sig den fremtidige Vedligeholdelse af Banen.

Et Mindretal (Djurhuus, O. F. Joensen og A. Samuelsen) ønsker ikke at fremsætte noget Forslag.

Forslag

fra Flertallet (Dam, Davidsen, Jacobsen og Winther):

Af økonomisk Fond ydes Jens Chr. Danielsen af Hestø et Tilskud paa 200 Kr. til Anlæg af en Tovbane (rennistrong) fra »Neytakonustíggj« ned til Kørevejen paa Betingelse af, at Hestø Sogns Kommune forpligter sig til at holde Tovbanen vedlige.

Beløbet udbetales, naar det ved lovligt Syn konstateres, at Banen er forsvarligt anlagt.

Tann 28. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 16 atkvøðum — 0.

191. Studningur til neystabygging. (23|XIII).

Figgjarnevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning**:

Til undertegnede Udvalg er henvist Ansøgning fra Aksel Beekker, Skuø, dateret 1. Marts d. A., om Tilskud til Opførelse af et Nøst.

Andrageren oplyser, at han under et Uvejr fik sin Oltemandsfarer slaaet i Stykker. Baadens Motor fik dog ikke nogen nævneværdig Skade. Grunden til, at Baaden blev slaaet i Stykker, var Mangelen af et Nøst.

Andrageren har nu faaet anskaffet sig en ny Baad og købt en Nøstegrund, men er ikke i Stand til selv at skaffe Midler til Opførelse af et Nøst.

Man beklager, at Andrageren har været ude for det Uheld at miste Baaden, og at han savner et Nøst.

Imidlertid ligger Tilskud af nævnte Art udenfor de Rammer, som Tinget i Almindelighed har sat for Ydelsen af Støtte, og Udvalget ser sig derfor ikke i Stand til at anbefale Ansøgningen.

Forslag.

Der sendes Ansøgeren en Afskrift af Betænkningen.

Tann 8. desember varð uppskot nevndarinnar samtykt við **14 atkvøðum — 0.**

192. Studningur vegna miseydnaðan fiskiskap. (24/XIII).

Figgjarnevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning:**

1) Daniel Jacob Danielsen af Nolso andrager om Tilskud fra Tinget i følgende Anledning:

Han var i Aar forhyret som Fisker med M/K »Cornlin«. Undervejs til Fiskeri ved Bjørneøen blev han syg, saaledes at han paa hele Fisketuren ikke kunde deltage i Fiskeriet. Hjemkommen fra Fiskeriet søgte han Lægehjælp, men blev i Løbet af Sommeren ikke saa rask, at han kunde deltage i Efteraarsfiskeriet. Sygdommen var ikke af den Art, at han kunde faa nogen Hjælp fra Føroya Vanlukkutrygging.

Amtet oplyser i Skrivelse af 10. f. M. at Andragerен den 27. Juli d. A. har faaet 100 Kr. til Livsophold i Henhold til Lov af 31. Marts 1936 om midlertidig Hjælp til vanskeligt stillede Fiskere.

2) Skomager Ole Olsen af Vaag ansøger om Tilskud fra Tinget og anfører i den Anledning følgende:

Han blev i Fjor Efteraar syg af Lungebetændelse og Mæslinger, og da han var blevet saa nogenlunde rask af disse Sygdomme, fik han ondartet Bronchitis, som varede i flere Maaneder. — Da han i Aar var bleven saa rask, at han kunde begynde at arbejde, tog han ind paa Skaalefjord med to Sønner for at deltage i Sildefiskeriet, men Fiskeriet mislykkedes i den Grad for dem, at de endda fik Underskud af Turen.

Begge Andragerne søger nu om Tilskud fra Tinget til Livsophold for dem og Familie.

Undertegnede Udvalg skal anføre, at Tinget ikke raader over Midler til at yde Hjælp i ovenfor anførte Anledning, og man

kan derfor ikke stille Forslag om at yde Tilskud til de to Andragere.

Derimod mener Udvalget at kunne henvise Andragerne til at søge om Understøttelse fra deres respektive Forsørgelseskommuners Hjælpekasser i Henhold til Lov af 29. April 1913, idet Hjælpekasserne er pligtige at yde Tilskud uden Fattighjælps Virkning. —

Forslag.

1) Der svares Andragerne, at Tinget ikke af de Midler, det raader over, ser sig i Stand til at yde Tilskud i ovenfor anførte Anledning.

2) Afskrift af nærværende Betænkning sendes Andragerne og Forstanderskaberne for Nolsø og Vaag Sognes Kommuner.

Tann 26. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 20 atkvøðum — 0.

193. Hiui av amtmanninum greiddu mál. (25|XIII).[1]

Amtmannsmálanevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning:**

Amtmannsmálanevndin hevur fann 4. f. h. m. gjøgnumhugt Løgtingsins journal, rokningsjournal og kopibók fyri tíðarskeiðið 29/7. 1935 til 1/11. 1936, og hevur nevndin ikki funnið nakað, vil meina at kunna átala.

Tann 26. november varð álitið góðkent við 17 atkv. — 0.

---

1) Sbr. løgtingstíðindi 1935, bls. 207.

194. Decisión av roknskapum. (26/XIII).[1]

Tann 16. desembar varð samtykt **Forslag til Decision** fyri fylgjandi roknskapir:

Færø Amts Bibliotek fyri árið frá 1/4. 1935 til 31/3. 1936.
Arkivafdelingen fyri s. á.
S/S »Smiril« fyri s. á.
Føroya Vanlukkutrygging fyri árið 1935.
Dykkerdragten fyri s. á.
Færøernes Kirkefond fyri s. á.
Færø Amts økonomiske Fond fyri s. á.
Fonden til Jordebvalsrettighedernes Afløsning fyri s. á.
Færø Amts Fattigkasse fyri s. á.
Grindegarnet i Vestmanhavn fyri s. á.
Fonden for Forulykkedes Efterladte fyri s. á.
Folkeskolelærernes Pensionsfond fyri s. á.
Forsikringsforeningen af Skolebygninger paa Færøerne fyri s. á.
Færø Amts Skolefond fyri s. á.
Færøernes Mellem- og Realskoles Pensionsfond fyri s. á.
Fonden til nyttige Skolebøgers Anskaffelse fyri s. á.
Pastor Engelsteds Deltagelses- og Erkendtlighedslegat fyri s. á.
Færøernes Amtskommunes Telefonvæsen fyri s. á.
Færøernes Amtskommunes Tuberkulosesygehus i Hoydal fyri s. á.
Skopen Havn fyri árini 1934 og 1935.
Frodebø Sogns Elektricitetsverk fyri árini 1934 og 1935.
Vaag Kommunes Elektricitetsværk fyri árini 1934 og 1935.
Trangisvaag Havn fyri árini 1934 og 1935.
Vaag Havnevæsen fyri árini 1934 og 1935.
Midvaag Havn fyri árini 1934 og 1935.

Sama dag vóru samlykt soljóðandi **uppskot** frá *figgjarnevndini*:

1) Da Regnskabet for Færø Amts Repartitionsfond for Aaret 1935 først er modtaget til Revision den 11. ds., og Revisionen af dette Regnskab derfor ikke har kunnet afsluttes i nærværende Løgtingssamling, stilles følgende

---

[1] Sbr. løgtingstíðindi 1935, bls. 297.

Forslag.

Amtmanden anmodes om efter Revisionens Afslutning at foretage den endelige Decision af Regnskabet.

og soljóðandi **uppskot** frá *kommunalu nevndini:*

2) Da Revision af Kommuneregnskaberne for Aaret 1935 ikke har kunnet tilendebringes inden Lagtingssamlingens Afslutning, stilles følgende

Forslag.

Amtmanden anmodes om efter endt Revision at forelage den endelige Decision af Kommuneregnskaberne for Aaret 1935. —

195. Toll av fluttningsgóðs. (27/XII).[1]

Fíggjarnevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning:**

Som det fremgaar af Lagtingstidende 1935, Side 350, har Lagtinget i sin forrige ordinære Samling behandlet Spørgsmaalet om, hvorvidt Bohave, der ellers er afgiftspligtigt, skal kunne indføres afgiftsfrit til Færøerne, naar Indførselen sker som Flyttegods.

Lagtinget vedtog at udtale, at man ikke mente, at der bør tilstaas Toldfrihed for toldpligtigt Flyttegods, men at Tilbagebetaling af erlagt Told for saadant Gods kan finde Sted efter Ansøgning, naar det dokumenteres, at de paagældende Varer atter er udført fra Færøerne.

Sagen har derefter været forelagt Finansministeriet, der i Skrivelse af 21. April d. A. bl. a. oplyser, at Flyttegods er »fritaget for Indførselstold, naar vedkommende Ejer har været bosat i Udlandet mindst 1 Aar og virkelig flytter derfra for at bosætte sig her, naar de paagældende Genstande bærer Spor af at være brugte, og naar de indføres for deres Regning og til Brug for dem, som allerede har afbenyttet dem; herom afgives skriftlig Forsikring paa Tro og Love til Toldvæsenet.

Toldfrihed for Flyttegods er ikke noget særegent for dansk Toldlovgivning, men praktiseres ogsaa i en Række andre Lande, f. Eks. i Sverige, Norge, Finland, England etc. Det er saaledes en almindelig Regel, at Flyttegods kan føres toldfrit fra det ene Land til det andet.

Naar Udlændinge efter de gældende Regler toldfrit kan indføre Flyttegods her til Landet, og Danske ligeledes toldfrit kan indføre Flyttegods i en Række fremmede Stater, synes det ogsaa rimeligt, at der heller ikke ved danske Statsborgeres Flytning fra en Del af Landet til en anden opkræves Afgifter af egentligt Flyttegods«.

Ministeriet har derefter anmodet Amtet om at gøre Lagtinget bekendt med de anførte Oplysninger.

Undertegnede Udvalg, der paany har gjort Sagen til Genstand for en indgaaende Overvejelse, mener ikke, at de af Ministeriet fremsendte Oplysninger er af en saadan Art, at de kan medføre en Ændring i det af Lagtinget i Samlingen 1935 indtagne Standpunkt, idet de Personer, der igen fraflytter Færøerne medbringende det Bohave,

---

1) Sbr. Løgtingstíðindi 1935, bls. 350.

hvorfor Afgift maatte være erlagt ved Indførselen kan faa den for disse Effekter erlagte Afgift refunderet, hvorved saadanne Personer i Realitetet opnaar Afgiftsfrihed for det Gods der flyttes, samtidig som der er sørget for, at det Indbo, der af de paagældende ved Fraflytningen bliver solgt her paa Øerne, bar baaret den Afgift, som der skal svares af enhver anden tilsvarende Vare, der indføres til Færøerne.

Under Henvisning til det anførte skal man tillade sig at fremsætte følgende

Forslag.

Idet Lagtinget henviser til de i Motiverne anførte Grunde, fastholder Tinget det i Samlingen 1935 — se Lagtingstidende 1935, Side 350 — indtagne Standpunkt.

Tann 21. november varð uppskot nevndartinnar samtykt við 20 atkvøðum — 0.

196. Útreiðslur viðv. statistik. (28|XIII).[1]

Figgjarnevndin framlegði soljóðandi **Betænkning:**

Denne Sag, som i sin Tid henvistes til Udvalget, har ikke kunnet behandles til Ende i denne Samling. Sagen maa derfor udsættes til næste Aar. En paatænkt Forhandling om Sagen med Amtmanden og Landfogden har ikke fundet Sted. Denne Forhandling anmoder man Vinnunevndin om at føre.

Forslag.

1) Sagen udsættes til næste Aar. —

2) Statsministeriet underrettes om Udsættelsen.

3) Vinnunevndin anmodes om at forhandle med Amtmanden og Landfogden om Sagen, navnlig om, hvorvidt der maatte kunne findes en mere praktisk Fremgangsmaade ved Tilvejebringelsen af statistisk Materiale, end den nu lovhjemlede. —

Tann 16. desember varð uppskot nevndarinnar samtykt við 16 atkvøðum — 0.

1) Sbr. løgtingstíðindi 1931, bls. 123.

197. Veðurtíðindi. (29|XIII).

Telefonnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit:**

Hetta mál er á fyrsta sinni tikið upp av »Føroya skipara- og navigatørfelag«. Síðani hevur tað verið til ummælis hjá Føroya amti, Det Danske Meteorologiske Institut, Føroya skipara- og navigatørfelag og hjá siýrarnum fyri telegraf- og telefonstøðunum í Havn. Av besum skjølum sæst, at fyrr vórðu veðurtíðindini frá Íslandi vegna eina landsins millum (internasionala) samtykla skipan kaðaltelegraferað frá Íslandi til ymisk onnur lond. Í Føroyum telefoneraði støðin í Havn veðurtíðindini út til allar tær bygdir, ið yusktu at fáa tey, tó vanliga soleiðis, at telefonstøðurnar bar fingu eina hóskandi peningliga samsýning fyri hetta frammihjáurbeiðið. Seinni, tá Reykjavík fekk sín nýbrúkta sterka radiosendara, vórðu veðurtíðindini send pr. radio beinan vegin frá Reykjavík til London. Hin gamla skipanin helt tá uppat av sær sjálvum. Veðurtíðindini frá Danmark verða nú eisini útkastað í radio, og øll tey í Føroyum, sum hava nóg sterkan móttakara, hava høvi til at fáa veðurtíðindini bæði frá Danmark og Íslandi. Tað er eisini at merkja, at veðurtíðindini nú eru nógv meira fjølbroytt enn áður.

Nevndin skal hesum máli viðvíkjandi loyva sær at seta fram sína hugsan:

Tað er sjálvandi einki, ið forðar fyri, at veðurtíðindini kunna avturlast av telefonverksins radiostøðu í Havn, bóast lurtingarviðurskiftini ikki eru tey bestu, har ið støðan stendur, og kan tað tí í einkultum førum kanska verða trupult at lurta við úrsliti vegna óljóð.

Harafturímóti heldur nevndin tað vera ivingasamt, um veðurtíðindini longur hava tann týðning sum fyrr, tá ið viðurskiftini eru tey, at so at siga hvørt føroyskt skip hevur radiomóttakara, og tað neyvan er nøkur bygd, hvar ikki ein ella fleiri tílíkir finnast. Øll, bæði skips- og heimafólk, ið hava radiomóttakara, eru, sum nú er, før fyri sjálvi at fáa hesi tíðindi, og í mongum førum vildu tíðindini, um tey vórðu send frá støðini í Havn út á bygdirnar, koma ov seint av tí, at tey í bygdunum, sum hava móttakara — t. d. meðan skipini eru á Suðurlandinum — siga hinum bygdafólkinum frá, hvussu veðurlíkindini eru. Harafturat vil arbeiðið hjá støðini í Havn við at lurta, niðurskriva og telefonera tíðindini út til bygdirnar vera so stórt, at tað umfraint at upptaka eina høvuðslinju frá Havnini, eisini vil seta eitt fólk í arbeiði megin partin av degnum, og táið hesar linjur eru sterkt upptiknar frammanundan, er tað skiluligt, at ein tílík skipan ikki bert vil tarna um arbeiðið við at koma fram, men eisini vera einstýðandi við eina beinleiðis útreiðslu hjá telefonverkinum.

Nevndin meinar tí av teimum framførdu grundum ikki at kunna áleggja telefonstøðini í Havn hetta stóra arbeiðið, og tað so mikið minni, sum spurningurin um ein sterkan sendara í Havn óivað verður tikin til viðgerðar í næstum, og er tað nevndins ætlan, at so skjótt sum spurningurin er loystur, vil hesin viðvíkjandi veðurtíðindunum verða greiddur av sær sjálvum.

Uppskot.

1) Tingið kann ikki, sum statt er, gera nakað við hetta mál.

2) Umsøkjarnir fáa eitt eintak av álitinum.

Tann 18. november framlegði Dam o. fl. soljóðandi **broytingaruppskot:**

Í staðin fyri punkt 1) í nevndaruppskotinum verður sett:

Málið verður beint í telefonmilluntinganevndina, ið fær í hendi at samráðast við telegrafstjóra Finsen og vitastjórnina um loyvi til við útvarping frá Mykinesi og Borini at kunngera veðurlíðindini fyri Føroyar.
Fyri hesari útvarping skipar telefonmilluntinganevndin.

Tann 21. november varð broytingaruppskotið samtykt við 20 atkv. — 0. Uppskot nevndarinnar pkt. 1) varð soleiðis burturdottið. Uppskot nevndarinnar pkt. 2) varð samtykt við 19 atkv. — 0.

198. Studningur til Føroya Fólkaháskúla. (30|XIII).[1] Umvæling av Føroya Fólkaháskúla. (31|XIII).

Figgjarnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit:**

Stjórn Føroya Fólkaháskúla hevur sent inn á ting tvær umsóknir; onnur er um vanligan studning — og verður eins og árini frammanundan søkt um 3000 kr. —, og onnur er um studning til umvøling av skúlahúsunum. Í hesi seinnu umsóknini verður greitt frá, at inntøkur skúlans eru so smáar, at tað hevur ikki verið møguligt at umsita húsini so væl, sum tað átti at verið.

Eftir einum sýni, sum Z. Jacobsen og H. A. Djurhuus hava gjørt, fer umvølingin at kosta o. u. 3000 kr.

Meirilnti nevndarinnar (Dam, Davidsen, Jacobsen og Winther) ræður tinginum til at samtykkja, at skúlin fær 3000 kr. í studningi og 1000 kr. árliga í trý ar til umvælingina.

Minnilnti nevndarinnar (Djurhuus, O. F. Joensen og A. Samuelsen) setir berl uppskot um, at skúlin fær vanligan studning: 1500 kr.

Uppskot

frá meiriluta nevndarinnar (Dam, Davidsen, Jacobsen og Winther):

1) Úr økonomiska grunninum verður veiltur Føroya Fólkaháskúla 3000 kr. í studningi fyri árið 1936/37. Studning-

---

1) Sbr. løgtingst. 1935, bls. 332.

urin verður latin við fjórðinginum fyri hvønn ársfjórðing frammanundan.

2) Úr økonomiska grunninum verður veittur Føroya Fólkaháskúla 1000 kr. árliga í trý ár (1936/37, 1937/38 og 1938/39) til umvælingar av skúlanum eftir teirri sýnsforrælning, sum gjørd er av Z. Jacobsen og H. A. Djurhuus. Roknskapur yvir umvælingina verður sendur tinginum á hvørjum ári í hesi nevndu trý árini.

frá minniluta nevndarinnar (Djurhuus, O. F. Joensen og A. Samuelsen):

Úr økonomiska grunninum verður veittur Føroya Fólkaháskúla 1500 kr. í studningi fyri árið 1936/37.

Studningurin verður latin við fjórðinginum fyri hvønn ársfjórðing frammanundan.

Tann 28. november varð uppskot meirilutans pkt. 1) samtykt við 16 atkv. — 0 og pkt. 2) við 14 atkv. — 0.

199. Søla av denatureraðum spritti. (32|XIII).

Ymsamálanevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning**:

Købmand Poul Isaksen som Indehaver af Materialhandelen »Sýran« ansøger om at faa Tilladelse til at udsælge denatureret Sprit paa samme Maade som det Udsalg, der i Forvejen har Bevilling.

Han oplyser, at Tórshavn By siden 1918, dengang den nuværende Bevilling blev givet, er voksel meget, og han mener, at det vil være mere bekvemt for Køberne, at der findes 2 Udsalgssteder, hvert i sin Del af Byen.

Ifølge Lov for Færøerne Nr. 115 af 4. April 1928 § 4 om Forbud mod at drive Erhverv med berusende Drikke, jfr. Lov Nr. 98 af 27. Marts 1934, skal det bestemmes ved Anordning, hvilke nærmere Regler, der gælder ved Salg af denatureret Spiritus. Anordning Nr. 213 af 24. Juli 1928 om Salg af denatureret Spiritus foreskriver, at der kræves særskilt Bevilling fra Amtet, og i Reglen maa saadan Bevilling ikke gives til Handlende. Paa samme Plads maa der kun meddeles en enkelt Person Bevilling.

Udvalget maa mene, at paa større Pladser er der meget, der taler for, at der kan gives Bevilling til 2 Personer. Dels vil det være bekvemt for Befolkningen, idet Afstanden saa ikke bliver saa lang at gaa, og dernæst vil der gennem Konkurrence kunne skabes Mulighed for billigere denatureret Spiritus. I det foreliggende Tilfælde finder Udvalget ogsaa, at det har Betydning at støtte Købmand Poul Isaksen, der har startet den første Materialhandel paa Færøerne, idet man skønner, at det har Betydning, at der findes en saadan i Thorshavn.

Udvalget skal derfor stille Forslag om den nødvendige Tilføjelse til den gældende Anordning og anbefale, at Amtet giver Købmand Poul Isaksen den omsøgte Bevilling, naar tilstrækkelig Lovhjemmel foreligger.

Forslag.

Tinget indstiller, at der vedtages følgende Tilføjelse til § 1 i Anordning Nr. 213 af 24. Juli 1928 om Salg af denatureret Spiritus:

»Dog kan der for større Pladsers vedkommende meddeles Bevilling til 2 Personer.«

Tann 21. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 18 atkvøðum — 0.

200. Studningur til tekniskan skúla í Klaksvík. (34/XII).[1]

Figgjarnevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning:**

Johannes Gaard ansøger for ovennævnte Skole atter i Aar om Støtte.

Udvalget foreslog i Fjor et Tilskud paa 400 Kr. for at der kunde oprettes en teknisk Skole i Klaksvig, idet det oplystes, at Skolen maatte have virket et Aar, førend den kunde faa Statstilskud.

Et Eksemplar af Skolens Driftsregnskab for Aaret 1935/36, fremsendt til Udvalget, viser, at Skolen faar et Statstilskud af 720 Kr., og at Driften slutter med et Overskud af Kr. 414,99.

Udvalget udtaler, at man ikke for det kommende Aar mener, at et Tilskud fra Tinget skulde være formodent, idet Statstilskudet maa være tilstrækkeligt til at holde Skolen i Gang.

Forslag.

Lagtinget mener ikke for i Aar at kunne yde noget Tilskud til teknisk Skole i Klaksvig.

Tann 21. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 17 atkvøðum — 0.

1) Sbr. løgtingst. 1935, bls. 322.

201. Studningur til sløjdskúla. (35|XIII).[1]

Fíggjarnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit:**

Eins og í farnum árum søkir Peter Poulsen um at fáa studning til skúlaskeið í sløjd. Hann sigur frá í umsøkn sínu, at hann er vanur at hava skúlaskeið um summarið fyri lærarar og onnur, og um veturin hevur hann kvøldskúla, sum vanliga verður vitjaður av bygdarfólki.

Nevndin heldur, at tað er beint at styðja hetta mál.

Uppskot.

Úr økonomiska grunninum verður veittur Peter Poulsen, Tórshavn, 300 kr. í studningi fyri árið 1936/37 til skúlaskeið í sløjd.

Tann 30. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 16 atkvøðum — 0.

---

[1]) Shr. løgtingstíðindi 1935, bls. 324.

202. Hvíldarheimið „Naina". (36|XIII).[1]

Fíggjarnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit:**

Saman við frágreiðing frá tíðini síðani hvíldarheimið »Naina« var tikið í brúk, hevur stýrið fyri hvíldarheiminum sent á ting umsókn viðvíkjandi tí løglingsstoðningi, ið játtaður var í 1934.

Í frágreiðingini, sum umfatar tíðarskeiðið frá 1. apríl til 30. september í ár, verður sagt frá, hvussu gingist hevur við heiminum. Tað hevur tíverri ikki verið vitjað so nógv, sum væntandi var. Miðaltalið av sjúklingum hevur soleiðis verið í hesum tíðarskeiði 6 í staðin fyri 12, sum ætlað var. Útreiðsturnar eru tí væl størri, enn kostnaðarætlanin vísir, nevniliga pr. sjúklingadag 4,09 kr., har kostnaðarætlanin hevur 3,11 kr.

Tað er ívaleyst rætt, soleiðis sum sagt verður í frágreiðingini, at atvoldin til, at heimið ikki enn verður vitjað so nógv, eru tær ringu tíðirnar og eisini, at fólk flest eru ókunnug við hvíldarheim og duga tí illa at meta ta nyttu, tey gera. Sum frálíður vit hvíldarheimið ívaleyst kunna gera sína fullu nyttu í okkara samfelagi.

Í løglingssetuni 1934 samtykti tingið at lata heimið fáa 1000 kr. í árligan studning frá tí degi, tað var tikið í brúk, og við teimum treytum, at tað varð góðkent av statinum, at Tórshavnar kommuna læt upp í 500 kr. í árligan studning, og at Classenska Fideicommis læt 1000 kr. í árligan studning. Hetta uppskotið varð endurnýggjað í lingsetuni 1935.

Stýrið fyri hvíldarheiminum sigur nú í umsókn sínu, at stjórnin fyri Classenska Fideicommis kann ikki binda seg til at lata árligan studning, við tað at teir hava tvey onnur hvíldarheim at styðja. Teir kunnu tí bert lata hendu studningin fyri eitt ár. Tingið verður tí biðið um at strika hesa treytina viðvíkjandi árligum studningi frá Classenska Fideicommis. Stýrið fyri hvíldarheiminum sigur, at tað hevur í ætlan at søkja um studning frá øðrum legatum, men soleingi treytin frá tinginum stendur óbroytt, kann heimið ikki fáa løgtingsstudningin.

---

[1]) Sbr. løgtingst. 1935, bls. 323.

Fíggjarnevndin er samd við stýrið og ræður tí tinginum til at strika treytina um árligan studning frá Classenska Fideicommis og setir fram betta

uppskot.

Úr amtsgrunninum veitur tingið hvíldarheiminum »Naina« árligan studning uppá 1000 kr. frá 1. apríl í ár, soleiðis at studningurin verður latin við einum fjórðingi í síðsta mánaði í hvørjum ársfjórðingi, við teimum treytum, at heimið verður góðkent av stutinum, og at Tórshavnar kommuna letur upp í 500 kr. í árligan studning.

Tann 21. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 19 atkvøðum — 0.

203. Kreditforeiningslán í Føroyum. (38|XIII).

Nevnd viðv. figgjarviðurskifti kommunana framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning** (sí skjal nr. 28).

Tann 15. desember framlegði J. Patursson soljóðandi **Ændringsforslag**:

Som nyt Pkt. 3 sættes:

»Naar Resultatet af Regeringens Medvirken foreligger, vil Sagen være at tilbagesende Løgtinget, før endelig Afgørelse træffes.«

Sama dag fall broytingaruppskotið, hert 5 atkv. — 0. Uppskot nevndarinnar varð samtykt við 23 atkv. — 0.

204. Lækkan av tvøstprísinum. (39)(XIII).

Fiskivinnunevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

Nevndin hevur fingið til viðgerðar eina umsókn til tingið frá Føroya javnaðarflokki, dagsett 10. oktober h. á., um lækkan av tvøstprísunum.

Tvøst hevur sum kunnugt stóran týðning í húsarhaldinum hjá Føroyingum, og tað hevur tí nógv at siga, at tað verður lætlig atgongd hjá fólki at fáa tvøst til bíligan prís. Meginpartarin av okkara húsmonnum er til sjós frá várinum til seint á heysti, og hevur soleiðis ringar umstøður at fáa døgurðamat.

Stórhvalaveiðan undir Føroyum verður nú drivin av 2 hvalaveiðufeløgum við tilsamans 5 hvalabátum. Løgtingið fær 50 kr. av hvørjum hvali, og roknað kann verða við einari árligari avgift av 5000 kr. Nevndin vil ráða til, at hesin peningur verður brúktur til at útvega teim, ið treingja til tað, bíligt hvalatvøst.

Tvøstprísurin verður nú ásettur eftir samráðing millum hvalaveiðufeløgini og eina nevnd, sum av tinginum er sett til hetta endamál. Tann núgaldandi prísur verður av mongum hildin at vera ov høgur, við tað at lítðirnar hava verið og eru so ógvuliga ringar. Hesin prísur hevur verið 9 oyr. kg. fyri nýskorið tvøst, hvar blóð og vatn ikki er frárunnið, og heldur nevndin tað vera tørvuligt at lækka prísin niður í 7 oyr. kg.

Tá nú spurningurin um lækkan av tvøstprísinum er komin fram, heldur nevndin, at tað eigur av verða skipað soleiðis fyri, at ein slík lækkan kemur øllum til góðar, soleiðis at prísurin fyri tvøstið verður tann sami um alt landið. Soleiðis sum nú er statt, verður tvøstið dýrast hjá teim longst burturliggjandi plássum, við tað at fraktin her kemur at vera so nógv hægri enn til tey pláss ið liggja høggliga fyri. Tað vil tí verða neyturvuligt samstundis sum tvøstprísirnir verða lækkaðir at fáa fraktspurningin loystan. Best vildi tað verið, um heilt illa stillaði húsarhald kundu fingið tvøst fyri einki.

Fyri at fáa henda spurningin loystan soleiðis, at tað kann koma teim mest treingjandi til góðar, vil tað verða neyðugt at fáa vissu fyri, hvat ið krevst tilsaman av bíligum hvalatvøsti í teim ymisku plássum, og nevndin heldur ta mest hóskandi skipan her vera, at kommunustýrini fáa hesar upplýsingar til vegar.

Hetta mál eigur at verða givið Vinnunevndini upp í hendi, soleiðis at nevndin kann fáa tær ca. 5000 kr., ið koma inn í hvalaavgift, at ráða yvir til lækkan av tvøstprísinum og fraktprísinum. Vinnunevndin kann so samráðast nærri við kommunustýrini um hetta mál, seta menn í Lopra og við Ár til at skera upp og salta tvøst, soleiðis sum tað vísur seg at vera tørvur til, og annars samráðast við hvalaveiðufeløgini um allar teir spurningar, ið koma at liggja fyri.

Um ikki høskandi flutningur av tvøsti kann fáast á annan hátt, skal Vinnunevndin skipa fyri hesum flutningi, soleiðis sum hann best kann fást í lag.

Uppskot.

1) Prísurin fyri nýskorið stórhvalatvøst í Lopra og við Air verður setur til 7 oyr. kg.

2) Vinnunevndin fær stórhvalauvgiftina til løgtingið fyri 1937 at ráða yvir til lækkan av tvøstprísunum og flutningsútreiðslunum.

3) Vinnunevndin skal samráðast við kommunurnar um keyp av stórhvalatvøsti, og, um tað verður neyðugt, skipa fyri flutningi o. ø.

Tann 9. desember varð uppskot nevndarinnar pkt. 1) samtykt við 13 atkvøðum — 0 og pkt. 2) og 3) við 14 atkvøðum — 0.

205. Kjøt frá Danmark. (40|XIII).

Ymsamálanevndin framlegði soljóðandi **nevndarállit:**

Javnaðarflokknrin á tingi hevur vent sær til Løgtingið um at taka til viðgerðar møguleikan fyri aftur at fáa kjøt til fátæk fólk frá Danmark, eins og tað var gjørligt fyri okkurt um 2 árum síðan.

Nevndin kann vera samsinnt við teir umsøkjandi um, at tørvur er á, at fátækum fólki verður veittur góður og bíligur døgurðamatur, og mælir til, at bønarbrævið verður sent amtmanninum, soleiðis at tingið biðjur hann, um gjørligt, fyrireika, at ein tílík skipan sum fyri 2 árum síðan kemur í lag.

Uppskot.

Tingið biður amtmannin fyrireika málið og venda sær til ríkisstýrið um at fáa í lag eina tílíka skipan sum fyri 2 árum síðan.

Tann 21. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 19 atkvøður — 0.

206. Rættarmálið í Føroyum. (42)XIII).

Ymsamálanevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit:**

Sjálvstýrisflokkurin hevur biðið tingið um at taka til viðgerðar spurningin viðvíkjandi rættarmálinum í Føroyum.

Aðrir spurninger um broytingar í rættargongdarlógini eru til viðgerðar á tingi, og nevndin hevur sett uppskot fram um, at hesir spurningar verða givnir amtmanninum, sorinskrivaranum og fútanum saman við Vinnunevndini til umhugsunar, soleiðis at sett fram verður uppskot til næsta ár.

So statt, heldur nevndin, at hetta mál um broytingar í rættargongdarlógini eigur at fylgjast við hinum og tí verður goymt til næsta ár.

Uppskot.

Málið verður sent til vinnunevndina til umhugsunar saman við spurninginum um aðrar broytingar í rættargongdarlógini.

Tann 14. november framlegði J. Paturson soljóðandi **broytingaruppskot:**

Í staðin fyri uppskot nevndarinnar verður sett:

§ 149, Stk. 1 og 2 affattes saaledes:

Retssprogel er Dansk og Færøsk. Afhørelse af Personer, der ikke er det danske eller færøske Sprog mægtige, foregaar ved Hjælp af en edsvoren Tolk eller en af Retten udmeldt Tolk. Dog kan Tilkaldelse af Tolk undlades, naar ingen af Parterne gør Fordring herpaa, og Retten tiltror sig fornødent Kendskab til det fremmede Sprog, undtagen ved Straffesager i Domsforhandling i Sager, der er underkastede Landsretsbehandling. Er Domneren ikke det færøske Sprog mæglig, foranlediger han, naar det maatte være fornødent, tilkaldt en kyndig Person til at fungere som Oversætter.

Dokumenter, der er affattede i fremmede Sprog, skal ledsages af en Oversættelse, der, naar Retten eller Modparten forlanger det, skal bekræftes af en autoriseret Translatør eller en af Retten anlagen Oversætter. Oversættelse kan dog frafaldes, naar begge Parter er enige derom, og Retten tiltror sig fornødent Kendskab til det fremmede Sprog. Er Dommeren ikke det færøske Skriftsprog mægtig, foranlediger han Dokumenter, affattede i det færøske Sprog, oversat, og saafremt Oversættelsen ikke godkendes af Parterne, skal den bekræftes af en af Retten udmeldt kyndig Person. I Tilfælde af en Anke eller Kære til Domstole udenfor Færøerne skal Dokumenter, affattede i det færøske Sprog, ledsages af en Oversættelse, foretaget af en dertil af Retten beskikket Person. Udgifterne ved de i dette Stykke omhandlede Oversættelser af færøske Dokumenter og de i forrige Stykke, sidste Punktum, omhandlede Tilkaldelser af Tolk udredes af Statskassen.

Sama dag varð broytingaruppskotið sett undir atkvøðisgreiðslu við *navnakall:*

Ja atkvøddu: Winther, Patursson, Zachariasen, Simonsen, Hansen, Danbjørg, Ellefsen, Miteus, M. A. Jacobsen, Kallsoy. *Atkvøddu ikki:* Rasmussen, Niclasen, Joensen, A. Samuelsen, Andreasen, M. Samuelsen, Nielsen, Davidsen, J. Poulsen, Djurhuus. *Burtur:* Dam, Nolsøe, Holm Jacobsen, H. J. Poulsen,

og varð uppskotið soleiðis burturdottið, bert 10 atkvøður — 0.

Uppskot nevndarinnar varð samtykt við 19 atkvøðum — 0.

207. Tolleftirlitið. (44(XIII).

Nevnd viðv. figgjarviðurskifti kommunanna framlegði soljóðandi **nevndarálit:**

Frá »Færøernes Købmandsforening« er komin umsøkn á ting um at fáa skipað tolleftirlit í Føroyum.

Nevndin ræður tinginum til at senda keypmannafelagnum eitt einlak av nevndarálitinum viðvíkjandi tollskipan.

Uppskot.

Svarað verður umsøkjaranum, at tingið hevur samtykt eina tollskipan fyri Føroyar. Eitt eintak av nevndarálitinum verður sent umsøkjaranum.

Tann 14. desember varð uppskot nevndarinnar samtykt við 20 atkvøðum — 0.

208. Studn. til upplæring í handverk. (45|XIII). Studn. til uppihald á sklpsverkstaði. (20|XIII).

Figgjarnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

1) Nr. XIII—45/1936: Umsókn frá Joen A. Rasmussen fyri eina nevnd.

Í umsóknini verður sagt frá, at tey trý politisku feløgini í Havn settu í vár eina 15-mannanevnd at kanna eftir ymsum viðurskiftum, og skuldi nevndin koma fram við uppskotum at seta á stovn slíkar fyritøkur, sum kundu byrgja fyri tí stóra arbeiðsloysinum.

Sjálvt tilfarið, sum nevndin hevur fingið til vegar, er sent Tórshavnar býráði, men nevndini er eyðskill, at tað er tørvur á — um slíkar fyritøkur skulu verða settar á stovn — at handverkarar okkara søkja sær lærdóm úti, soleiðis at teir kunnu vera væl útbúnir til handverk sítt.

Nevndin beitir tí á Løgtingið og biðir tað veita pening árliga til handverkarar, sum ætla sær út at læra.

Meiriluti nevndarinnar (Dam, Davidsen, Jacobsen og Winther) ræður tinginum til at lata studning og setir fram hetta

uppskot.

Úr økonomiska grunninum verður latið Vinnunevndini at hava um hendur 1000 kr. fyri árið 1936/37 til ferðastudningar fyri handverkarar, sum ætla sær út at læra fyri at búgva seg út í handverki sínum.

---

2) Nr. XIII—20/1936: Umsókn frá Sofus Rasmussen.

Sofus Rasmussen søkir um studning til ferðalag og uppihald á einum fullfíggjaðum skipaverkstað. Hann ætlar sær at vera burtur eina 6—8 mánaðar og biður um 800—1000 kr. í studningi.

Nevndin heldur ikki, at tað fer at bera til at veita so stóran studning.

Uppskot.

Løgtingið er ikki fært fyri at veita tann umsøkta studning.

Tann 28. november varð uppskot nevndarinnar í mál nr. 45/XIII samtykt við 13 atkvøðum — 0 og í mal nr. 20/XIII við 15 atkvøðum — 0.

---

209. Studningur til cementbetonvegg í Sandavági. (46/XIII).

Fíggjarnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit:**

Frá nøkrum Sandavágsmonnum er komin umsókn um studning til bygging av einum betonveggi.

Í umsóknini verður greitt frá, at tað er neyðugt at byggja hendu veggin ella garðin til verju móti brimi. Nú er soleiðis statt, at at høurin verður mataður burtur, og fer helta leudi, er vandi fyri, at tann parturin av vegnum til Miðvágs, sum her er, eisini fer. Samaleiðis er við vegnum eftir Valloyrúni. Tað, sum fyrr vardi høin, var

ein urðarrúgva av malargróti, men grótið er í teim seinastu árunum tikið til betonhúsagerð. Kommunan har vesturi hevur eisini brúkt ein stórau part av hesum gróti til vegagerð og til bygging av skúlahúsum og kirkjugarði.

Sóknarstýrið gevur umsóknini viðmæli, og álitismaður løgtingsins Jens M. Poulsen hevur verið har vesturi og kannað eftir, hvat ið gerast skal. Eftir hansara kostnaðarætlan fer veggurin at kosta 3000 kr. tilsamans. Tilfarið er mett at kosta 850 kr., og formannsløna er ætlað at verða 350 kr.

Nevndin heldur, at tað eigur at verða átalað, at grót, ið hevur ligið sum ein náttúrlig verja móti brimi, verður tikin burtur til skaða fyri lendi, sum tá verður matað burtur. Í staðin fyri sjálv at taka slíkt grót, eigur kommunan gjøgnum sítt stýri at ansa eftir, at grótið verður liggjandi sum verja.

Meirituti nevndarinnar (Dam, Davidsen, Jacobsen og Winther) ræður tinginum til at lata studning og setir fram hetta

uppskot.

Ur økonomiska grunninum verður veittur Sandavágsmonnum studningur til bygging av betonveggi inni á Eyrinum, tilsamans 720 kr., nevniliga $^3/_5$ av kostnaðinum til tilfar og formannsløn, við teimum treytum, at arbeiðið verður gjørt eftir teirri ætlan, sum gjørd er av Jens M. Poulsen.

Peningurin verður goldin, tá ið arbeiðið er liðugt.

Tann 10. desember varð uppskot nevndarinnar sett undir atkvøðisgreiðslu við *navnakall* og varð samtykt við 16 atkvøðum — 0. (Djurhuus, Rasmussen, Niclasen, A. Samuelsen, Andreasen, M. Samuelsen og Johan Poulsen *atkvøddu ikki* og H. J. Poulsen var *burtur.*)

210. Studningur til læraranámskeið. (47|XIII).[1]

Fíggjarnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

Føroya lærarafelag hevur sent umsókn inn á ting um, at tann studningur til námskeið, sum játtaður varð í tingsetuni 1935, og sum loyvdur var at goyma til 1937, verður hækkaður frá 300 kr. upp í 500 kr. Formaður felagsins greiðir frá, at útreiðslurnar til náms keið hesi seinastu árini, tá ið felagið hevur haft lærara úr Danmørk ella úr øðrum londum, ongatíð hava verið undir 600 kr. Ætlanin er komandi summar at hava náms keið í landalæru við donskum lærara, nevniliga harra Niels Jul, læraraskúlastjóra í Vordingborg.

Meirilutí nevndarinnar (Dam, Davidsen, Jacobsen og Winther) ræður tinginum til at samtykkja, at umsóknin verður játtað og setir fram hetta

uppskot.

Tingið samtykkir, at tann studningur til námskeið í landalæru, sum játtaður var Føroya lærarafelag í tingsetuni 1935, verður hækkaður frá 300 kr. upp í 500 kr. við teirri treyt, at námskeiðið verður summarið 1937.

Peningurin verður latin úr økonomiska grunninum móti kvittan frá formanni felagsins.

Tann 30. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 16 atkvøðum — 0.

---

[1]) Sbr. løgtingst. 1935, bls. 18.

211. Studningur til „Varðan". (48|XIII).[1]

Fíggjarnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

Felagið Varðin hevur í ár eins í undanfarnum árum sent umsókn á ting um studning. Sum kunnugt er Varðin einasta føroyska bókmentafelag og hevur til høvuðsstarv at geva út bøkur og tíðarrítið »Varðan«. Tað er eyðskilt, at tað má gangast strevið hjá felagnum í hesum ringu tíðum við bókaútgávum, men kortini hevur tað eydnast Varðanum at geva út Jóhannesar evangelium umsett av J. Dahl, og við hesi útgávu hevur Varðin nú útgivið allar biblíutýðingarnar í Nýggja Testamentinum.

Nevndin vil tí ráða tinginum til at veita felagnum studning og setir fram hetta

uppskot.

Úr økonomiska grunninum verður veittur studningur uppá 500 kr. til Felagið Varðan fyri árið 1936/37 móti kvittan av formanni felagsins Richard Long.

Tann 21. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 18 atkvøðum — 0.

---

[1]) Sbr. løgtingst. 1935, bls. 325.

212. Studn. til týðing av skaldaverki. (50|XIII). Studn. til Chr. Matras. (41|XIII).[1]

Fíggjarnevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit:**

Nr. XIII—50/1936: Umsókn frá J. H. O. Djurhuus:

J. H. O. Djurhuus, sum er farin undir at týða tey heimsgitnu skaldaverkini: Ilionskvæði og Odysseusarkvæði, sokir um studning frá løgtinginum. Áður hevur hann fingið studning frá ríkisstýrinum til hetta arbeiði.

Uppskot.

Úr økonomiska grunninum verður veittur J. H. O. Djurhuus studningur til tað umsøkta týðingararbeiði fyri árið 1936/37, stórur 500 kr.

Nr. XIII—41/1936: Umsókn frá Chr. Matras.

Chr. Matras, doktari, søkir eins og í fjor um studning frá tinginum til rannsóknararbeiði viðv. føroyskum máli.

Meirihluti nevndarinnar (Dam, Davidsen, Jacobsen og Winther) setir fram hetta

uppskot.

Úr økonomiska grunninum verður veittur Chr. Matras, doktara, studningur fyri árið 1936/37, stórur 1200 kr., og verður studningurin latin við 100 kr. um mánaðin.

Tann 27. november varð uppskot nevndarinnar í mál nr. 50/XIII samtykt við 20 atkv. — 0 og í mál nr. 41/XIII við 14 atkv. — 0.

---

1) Sbr. løgtingstíðindi 1935, bls. 290.

213. Børn í arbeiði undir skúlatíð. (51)(XIII).[1]

Skúlanevndin framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

Í tí vanligu lingsetuni 1935 samtykti tingið at biðja skúlastjórnina kanna eftir, hvørja støðu skúlanevndir og søknarstýri høvdu til málið um »børn í arbeiði undir skúlatíð« og síðani leggja málið fyri tingið við skúlastjórnarinnar ummæli.

Í bræví dagsett 14. oktober 1936 hevur skúlastjórnin lagt málið fyri tingið við svari frá øllum søknarstýrum, aftanná at skúlanevndirnar hava givið sínt viðmæli.

Søknarstýri við skúlanevndum ráða øll frá at fyriskipa reglur viðvíkjandi hesum máli, undantikuar tvær kommunur. Skúlastjórnin ræður eisini frá.

Tá so er statt, heldur nevndin ikki vera grundir fyri, at lóggáva viðvíkjandi hesum máli kemur í lag fyri fyrst.

Uppskot.

Tingið heldur ikki sum statt er vera grund til at gera lógreglur um »børn í arbeiði undir skúlatíð«.

Tann 21. november varð uppskot nevndarinnar samtykt við 13 atkvøðum — 0.

---

1) Sbr. løgtingst. 1935, bls. 280.

214. Studningur til bátsskipan í Hvalbæ. (52|XIII).

Nevnd viðv. „Arctic“ framlegði soljóðandi **nevndarálit**:

5 Hvalbingar hava vent sær til Løgtingið.

Teir hava róð út í summar frá Føroyingahavnini í Grønlandi. Teir sigu, at tað er trupult at selja liskin, og at teir hava frætt, at aðrir, ið hava róð út frá Føroyingahavnini, hava fingið studning frá tinginum, og søkja tí um ein tílíkan studning.

Tað er upplýst, at teir hava fiskað ca. 190 skpd., ið má haldast at hava eitt virði av ca. 7500 kr. Teir hava sett helvtina, og útreiðslurnar hjá teimum hava verið ca. 3300 kr. Um teir fáa sett alt, fáa teir ca. 800 kr. í part.

Nevndin skal upplýsa, at Løgtingið bert eina ferð hevur givið pening til menn, ið hava róð út frá Føroyingahavnini, og tað var ikki sum studningur, men ein premia uppá 500 kr. til Elias Johannesen úr Miðvági, ið var fyrsti maður, sum róði út frá Føroyingahavnini.

So statt heldur nevndin, at tingið ikki kann veita teim umsøkjandi Hvalbingum studning.

Uppskot.

1) Tingið kann ikki veita teim umsøkjandi studning.

2) Avskrift av álitinum verður teimum sent.

Tann 10. desember varð uppskot nevndarinnar samtykt við 18 atkvøðum — 0.

215. Samtykt til lán til Tórshavnar býráð. (53|XIII).

Tann 20. oktober samtykti tingið við 13 atkv. — 0 soljóðandi **uppskot til gerðabókina:**

»Tinget tillader for sit Vedkommende, at Thorshavn Byraad til Kajbygning optager et Laan paa 300.000 Kr.«

216. Spansk børn til Føroyar. (54|XIII).

Figgjarnevndin framlegði soljóðandi **Udvalgsbetænkning:**

Henvisende til en af Absalon Joensen, Thorshavn, skrevet Artikel vedrørende ulykkeligt stillede spanske Børns Optagelse i færøske Hjem har Lagtingsmand P. M. Dam i en Skrivelse af 20. Oktober d. A. andraget Lagtinget om at yde Gennemførelsen af den i nævnte Artikel omhandlede Tanke velvillig Støtte med et pekuniært Bidrag samt Medvirkning til, at den fornødne Opholdstilladelse for Børnene erholdes.

Sagen var til 1. Behandling den 31. f. M. og er blevet henvist til nærværende Udvalg.

I en Sagen bilagt Skrivelse af den 12. ds. har Hr. Absalon Joensen meddelt Udvalget, at der er dannet en Komité til Forberedelse af omskrevne Børns Optagelse i færøske Hjem. Komitéen oplyses at bestaa af følgende Personer:

Overlærer Kristoffer Lützen, Thorshavn,
Lærer H. A. Djurhuus, —
Redaktør L. Samuelsen, —

Konsul Poul Hansen, Thorshavn,
Absalon Joensen, —
Pastor Bookenoegen, —
Lærer J. H. Daubjørg, Porkere,
Skibsfører Jacob Nielsen, Vaag.

Komitéen havde paa daværende Tidspunkt ikke konstitueret sig.

I en beslagt Skrivelse af 19. ds. oplyser Absalon Joensen, at Komitéen, der nu tillige bestaar af Konsulinde Hansen og Fru Direktør Hansen, den 15. ds. har konstitueret sig med

Absalon Joensen som Formand,
H. A. Djurhuus som Næstformand,
Bookenoegen som Kasserer og
Kristoffer Lützen som Sekretær.

I denne Skrivelse udtales Ønsket om snarest belejligt at maatte erholde en Udtalelse fra Amtmanden og Lagtinget om, hvorvidt Opholdstilladelsen for de spanske Børn kan forventes, samt om der er Udsigt til økonomisk Støtte til Sagens praktiske Gennemførelse. Som Baggrund for denne Henvendelse anføres, at Befolkningen paa Færøerne øjensynlig har Sympati for Tanken, siden der udelukkende paa Grund af den Omtale, Sagen har faaet i Dagspressen, er indkommet godt 60 Tilbud fra Bygderne og fra Thorshavn om Modtagelse af spanske Børn i færøske Hjem. Af disse 60 Hjem kan 50 regnes som fuldtud forsvarligt og gode Hjem for de spanske Børn at komme til.

